## Skår Senior fekk met-prís fyri makrel

**Teir høvdu 300 tons av makreli, sum teir fingu ein miðalprís fyri uppá 10,77 krónur fyri kilo**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Miðskeiðis í hesi vikuni hevði norski báturin, Skår Senior, eina rættiliga góða makrelsølu í Noregi.

Teir høvdu 300 tons av makreli, sum teir fingu ársins besta prís fyri, nevniliga 10,77 norskar krónur!

Umborð á Skår Senior er eitt nú Høgni W. Høgnesen, sum býr á Toftum. Hann er maskinmeistari við skipinum.

Høgni er annars formaður í felagnum, Føroyskir Fiskimenn Uttanlands.

Hann hevur siglt í Noregi í fleiri ár.

### Nýggjur bátur

Um Skår Senior er annars at siga, at skipið er 55,24 metrar langt og 11 metrar breitt.

Skipið er bygt hjá A/S Båtbygg í Noregi í 2003, og høvuðsmotorurin er 3.264 hk.

# Sigri, Mortan og Gianfranco heiðraði

**Hósdagin vóru virðislønir M.A. Jacobsen latnar. Sigri M. Gaini fekk virðislønina fyri fagrar bókmentir, Mortan Winter Poulsen fekk virðisløn fyri mentaravrik, og Gianfranco Contri fyri yrkisbókmentir**

VIRÐISLØNIR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Tey trý, sum hósdagin fingu handað M. A. Jacobsen virðisløn: f.v. Mortan Winther Poulsen, Sigri M. Gaini og Gianfranco Contri.*
*mynd: Jens Kr. Vang*

Nógv fólk var komið saman, tá ið M. A. Jacobsen virðislønirnar 2004 vóru handaðar á samkomu í Sjónleikarahúsinum hósdagin. Tríggir virðislønir vóru latnar í ár fyri ávíkavist fagrar bókmentir, yrkisbókmentir og mentanaravrik. Eingin barnabókaheiðursløn varð latin í ár.

### Einsligt arbeiði

Yrkjarin Sigri M. Gaini úr Havn fekk virðislønina fyri fagrar bókmentir fyri triðja savnið hjá sær, 2002 nætur. Sigri sigur, at virðislønin hevur nógv at siga fyri seg.

– Eg kenni tað sum eina viðurkenning av tí, sum eg geri. Tað er ofta ógvuliga einsligt at yrkja, men ein slík virðisløn sigur mær, at tað er onkur, sum lesur tað, ið eg skrivi, sigur Sigri M. Gaini.

– At ein hevur fingið eina slíka viðurkenning, kann kanska eisini hava við sær, at mítt arbeiði í framtíðini verður tikið í størri álvara. Kanska skapar tað eisini størri áhuga fyri mínum yrkingum, og tað hevði ikki verið so galið, sigur Sigri M. Gaini.

Í grundgevingum sínum fyri at lata Sigri virðislønina sigur nevndin fyri mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens m.a.: Stílført, men við kílum av harðligum myndum gjøgnum savnið, skapar hon við yrkingum sínum eina kensluliga heild í skiftandi litum og ljósi.

### Slóðbrótandi orðabók

Virðislønina fyri yrkisbókmentir fekk Gianfranco Contri, sum hevur givið út føroysk-italska orðabók. Hetta er tann fyrsta orðabókin millum føroyskt og romanskt mál, og tí má sigast, at hon er rættuliga slóðbrótandi. Nevndin segði í sambandi við hesa virðisløn, at orðabøkur eru hornasteinar. Samskiftið er ein hjartatáttur, tað veri í vinnu ellan mentan, og málið er besta farleiðin.

Seinastu virðislønina fekk Mortan Winther Poulsen. Hendan virðislønin var latin fyri eitt serstakt mentanaravrik. Sum formaður í Føroya Forngripafelag hevur Mortan starvast áhaldandi og ótroyttandi fyri at vekja áhuga fyri okkara byggisøguliga siðaarvi og fyri at geva honum gætur, segði nevndin millum annað í grundgevingum sínum. At vit fleiri staðnis kring landið hava varveitt serstakar búsetingar, er ikki minst Mortani fyri at takka, tí hann hevur fingið í lag, at hetta er blivið varveitt.

Allar tríggjar virðislønirnar eru áljóðandi 20.000 krónur.

# Parkeringsforboð við størru vegirnar

**Tórshavnar Býráð hevur ætlanir um lýsa fullkomið parkeringsforboð á størri vegunum í Havn, til tess at betra um útsýnið og trygdina á teimum vegum, har bussleiðin koyrir**

PARKERINGSVIÐURSKIFTI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Á Landavegnum er ætlanin at lýsa parkeringsforboð í báðum síðum frá Frælsinum og út á Ringvegin, men undantak verður tó gjørt her við handilin hjá Gunnleivi, har nakrir básar væntandi verða gjørdir.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað hevur mangan verið ein stórur trupulleiki hjá Bussleiðini í Havn at koma fram eftir vegunum, tí at bilar standa parkeraðir framvið vegunum. Tískil hevur Tórshavnar Býráð nú ætlanir um at lýsa parkeringsforboð á báðum síðum á størru vegunum í Havn. Hetta er galdandi fyri eitt nú Landavegin, Argjavegin og Stoffalág.

### Parkeringstrupulleikar kring allan býin

Í farnu viku sendi býráðið bræv til hoyringar út til teir borgarar, ið búgva fram við hesum vegum, har ætlanin er at lýsa parkeringsforboð. Sjúrður Olsen, formaður í teknisku nevnd býráðsins, sigur, at talan er um ein trupulleika, ið hevur verið í nógv ár. – Tað er í dag tíverri so, at tað mangan kemur fyri, at bussarnir standa fastir, tí teir ikki sleppa fram fyri parkeraðum bilum, sigur hann.

Formaðurin í teknisku nevnd hjá býráðnum sigur eisini, at tá ið slík parkeringsforboð verða lýst, er neyðugt eisini at hugsa um, at tørvur kemur at verða á smærri parkingsøkir ymsastaðnis í býnum, nærheindis har forboð verður lýst.

Á Landavegnum er ein tann størsti trupulleikin við parkeraðum bilum uttan fyri handilin hjá Gunnleivi, men júst her ætlanin at gera eitt undantak. Sjúrður Olsen sigur, at framman fyri handilin hjá Gunnleivi er ætlanin at gera nakrar básar, soleiðis at tað framvegis fer at bera til at seta bilin uttan fyri handilin.

### Fólk fylgja ikki byggiloyvum

Í sambandi við allar nýbyggingar av sethúsum í kommununi, verður tað sett sum krav, at tvey parkeringspláss verða gjørd á stykkinum, men hetta verður ikki fylgt, sigur Sjúrður Olsen. – Fólk vilja heldur parkera úti á vegnum, og so brúka tey stykkið til okkurt annað. Nú hava vit so gjørt av, at fólk frá býráðsins umsiting skulu út at kanna eftir, um byggingin í nýggju býlingunum í Havnini er í tráð við byggiloyvini, sigur Sjúrður Olsen.

## Kjakast um burturbeining

Fríggjadagin var skipað fyri ráðstevnu um lokal Agneda 21 tiltøk. Ráðstevnan varð hildin á bæði Hotel Hafnia og í Vestmanna. Høvuðsevni á ráðstevnuni var burturbeining og umhvørvi annars.

Fyrst hittust luttakararnir á Hotel Hafnia, har bæði álendingar og íslendingar løgdu fram úr teirra arbeiða innan Lokan Agenda 21 arbeiði og burturbeining. Á miðdegi varð síðani farið til Vestmannar, har lokala eldsálin innan Agenda 21 arbeiði, Finnbogi Joensen, greiddi frá um tey Agenda 21 tiltøk, sum vóru í bygdini.

**tn**



# Atlantis nýggja ljóðútgerð

**Fyrr í hesi vikuni var chefteknikkarin frá Nordisk Film A/S í Klaksvík og setti upp nýtt ljóðanlegg til biografin í Atlantis. Hetta hevur longi ligið á láni, sambært dagliga leiðaranum, Høgna Klakkstein, sum fegnast um betraðu góðskuna**

BIOGRAFUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Allan Lyman frá Nordisk Film A/S setti nýggja ljóðanleggið upp. Ikki kann annað sigast enn at munurin er sjónligur á gamla høvuðshátalaranum, sum Allan heldur í og tí nýggja sum stendur við síðuna av*

**Klaksvík:**
Nú kunnu biografgangarar fegnast um, at bæði ljóð og myndgóðskan í biografinum í Atlantis er munadi betur.

Mikukvøldið koyrdi biografurin nevniliga fyri fyrstu ferð við nýggju útgerðini.

Talan er um nýtt surround anlegg, nýggja og sterkari peru, sum ger myndina munandi skarpari og hartil koyrir alt talgilt nú eitt nýtt tónhøvd eisini er keypt.

Hetta fegnast Høgni Klakkstein sum vera man um, og sigur hann, at nú er tað tað besta í Atlantis, sum ein kann fáa, tá ið tað umræður ljóð og mynd.

– Frammanundan høvdu vit eitt anlegg og ein prosessara, sum ikki var stórt frægari enn tað, sum tannáringar hava á sínum kamari í dag. Og tað ber jú ikki til, tey skulu helst fáa munandi betur góðsku, tá tey so koma í biograf, sigur hann.

Inni í sjálvum salinum hanga nú munandi fleiri og størri hátalarar. Eisini eru máttur hongdar ár veggirnar fyri at dempa rúmið.

– Akustikkurin var ræðuligur inni í salinum, men hasar mátturnar og teppið á gólvið gera stóran mun, greiðir Høgni frá.

Nýggja anleggið kostar knappliga 200.000 krónur við uppsetan.

### Tak skiftast

Hetta ljóðanleggið er bara eitt av trimum broytingum, sum verða í Atlantis ta komandi tíðina.

Sjálvsognarstovnurin fekk loyvi at hækka lánið við 600.000 krónum til skift av taki, ljóðanlegg og nýtt tónleikaanlegg. Sjálvandi røkka pengarnir ikki so langt, men við hjálp frá góðum stuðlum, sigur Høgni, at tað fer at bera til at fáa alt til heildar.

Raðfestingin var soleiðis, at takið fyrst og fremst skuldi skiftast, síðani ljóðanlegg og at enda tónleikaanleggið. Men fíggingarstovnurin gekk við til at seta 400.000 av teimum 600.000 til síðis til takið og síðani kundu hinar 200.000 nýtast til millum annað ljóðanleggi og nýggju kioskina. Takið á Atlantis skal helst skiftast sum skjótast, tí í herviliga áarførinum hesa vikuna, hevur tað víst seg, at tað lekur sera illa.

– Tónleikaanleggið, sum helst eisini kostar umleið 200.000 krónur, fer helst bíða nakað enn, men vit hava stórliga brúk fyri tí, tí sum nú er mugu vit leiga anlegg + mann hvørjaferð, greiðir Høgni frá.

Fyri fyrst er so nýggja ljóðanleggið í sjálvum biografinum komið upp, og Høgni vónar, at tað kann verða við til at lokka enn fleiri í biograf í Atlantis.



*Gamli prossessorarin og tann nýggi lið um lið. Munur er á, og tað hoyrist so sanniliga aftur úti í salinum*

# Tvey spor í uppihaldsloyvinum

**Bergur Berg, ráðgevi í Innlendismálaráðnum, sigur, at tað er stórur munur á, tá útlendingar søkja um arbeiðsloyvi og familjusamanføring í Føroyum. Hetta kann hava við sær, at mál verða truplari enn neyðugt**

ÚTLENDINGAMÁL
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Tá talan er um leysari familubond ella annað, so kann útlendingurin fáa rætt til familjusamanføring, sigur Bergur Berg*

Í sambandi við nógvu málini, sum koyra í løtuni, um útlendingar, sum annaðhvørt eru vístir av landinum ella verða tað, er alt ikki bara so svart ella hvítt, sum ofta verður víst á.

Reglurnar eru greiðar, sum myndugleikarnir skulu fylgja, men tað eru tveir ymiskir møguleikar, sum ein umsøkjari hevur. Alt eftir hvørjar hansara ella hennara umstøður eru.

– Tað koyrir í tveimum sporum, tá útlendingar skulu søkja um uppihaldsloyvi, greiðir Bergur Berg frá. Annaðhvørt kunnu tey søkja um arbeiðsloyvi ella um familjusamanføring.

Munurin á hesum báðum er bæði stórur og avgerandi. Tí tá ein persónur søkir um arbeiðsloyvi verða hansara persónligu viðuskifti so at siga ikki tikin við. Men tað verða tey hinvegin, tá søkt verður um familjusamanføring.

### Tríggir spurningar

Bergur Berg frá Innlendismálaráðnum greiðir frá, at tá ein persónur søkir um arbeiðsloyvið, verður støða tikin til tríggjar spurningar.

– *Er talan um eftir føroyskum viðurskiftum serliga kvalifiseraða arbeiðsmegi?*

– *Eru arbeiðsviðurskiftini t.e. setanarkor, løn og so framvegis eftir føroyskum fyritreytum?*

– *Og er tørvur á arbeiðsmegini?*

– Hatta eru teir tríggir spurningarnir, sum tað er lógarkravt av donsku myndugleikunum at biðja okkum taka støðu til. Ongin persónlig viðurskifti verða tikin við, greiðir hann frá.

Tað sum sást á pappírinum, sum umsøkjarin sendir inn, er, um viðkomandi er stakur ella giftur. Um viðkomandi hevur børn ella ikki og um tey eru í sama landi ella ikki. Aðrir persónligir upplýsingar eru ikki at síggja, tá ein søkir um arbeiðsloyvi.

### Skeivar fortreytir

Tískil ber til at koma til ta niðurstøðu, at í fleiri førum søkja tey um uppihaldsloyvi undir skeivum fortreytum, um so er at persónlig viðurskifti gera seg galdandi.

Tí tað er nevniliga soleiðis, at tá ein hevur fingið familjusamanføring, er so at siga júst tað sama galdandi, sum tá ein hevur fingið arbeiðsloyvi. Tað vil siga, at ein kann halda fram í sínum arbeiði. Men tó er familjusamanføringin eisini galdandi í ávíst tíðarskeið, til dømis fyri eitt ár í senn.

Hetta ger greitt, at um umsøkjari hevur serligar persónligar umstøður, sum kunnu gera, at viðkomandi heldur, at hann átti at fingið loyvi at verða í landinum, so nyttar tað onki at søkja um arbeiðsloyvi, tí her verður ikki hugt at teimum persónligu viðurskiftunum. Viðkomandi kann sostatt eisini søkja um familjusamanføring. Men tað er sjálvandi ein spurningur um hvørja niðurstøðu ið avgerandi myndugleikin kemur til – óansæð hvat so verður søkt um.

Tó skal leggjast afturat, at tað er munur á, um útlendingur og føroyingur eru gift ella ikki.

Tá útlendingur og føroyingur eru gift, hava samlív og/ella eiga barn, so SKAL útlendingurin fáa rætt til familjusamanføring. Men tá talan er um leysari familubond ella annað, so KANN útlendingurin fáa rætt til familjusamanføring.

Munurin millum skal og kann er sostatt av alstórum týdningi her. Um útlendingur og føroyingur eru gift, er ongin trupulleiki. Ei heldur um tey hava havt veruligt samlív í longri tíðarskeið.

## Skótahjálpin bankar aftur á dyrnar

**Skótar kring landið fara nú aftur at bjóða seg til at hjálpa við ymsum fyrifallandi. Samsýningin fer óskerd til skótahjálpina**

SKÓTAHJÁLPIN 20 ÁR
*tíðindaskriv*

Hóast neyðin er stór um allan heimin, so fer skótahjálpin aftur í ár til verka í góðum treysti.

Skótahjálpin kann einans verða sum ein dropi í havinum, men tað ber ikki til bara at setast hendur í favn og spyrja »Hvat nyttar tað sindrið, sum Skótahjálpin er før fyri, tá ið hugsað verður um alla neyðina, sum leikar á um allan heim«.

Hóast henda kunnleika um ta neyð, ið leikar á um allan heim, fer Skótahjálpin til verka í títreysti, at øll hjálp er til bata.

Skótahjálpin veit eisini, at um tygum ikki taka undir við teimum tiltøkum, ið vit kunnu hjálpa tygum við, so verður eingin Skótahjálp. Tí takka vit tygum, sum taka ímóti okkara tilboði um at hjálpa tygum við einumhvørjum, hjartaliga fyri vælvildina.

Um eitthvørt er áfatt hjá tygum, so eru skótarnir fúsir at hjálpa tygum við tí. Tað ræður um, at skótin sleppur at gera eitthvørt, sum viðkomandi fær eina samsýning fyri.

Endamálið er, at frísk børn hjálpa sjúkum børnum. Tað eru frísk og ferðug børn, ið vilja stuðla og hjálpa neyðstøddum, sjúkum og annars illa støddumbørnum og ungum - bæði her á landi og úti í heimi.